**Upprit viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 46/2009: Uppskot til løgtingslóg um havnargjøld v.m.**

Tann 5. november 2009 legði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum fram uppskot til løgtingslóg um havnargjøld v.m.

Sambært viðmerkingunum er høvuðsendamálið við uppskotinum, at Strandfaraskip Landsins skulu verða undantikin at rinda havnargjald. Samstundis verður rætturin hjá kommununi at krevja m.a. havnargjald frá øðrum brúkarum staðfestur.

Talan er sostatt um at flyta eina útreiðslu, sum landskassin rindar í dag, til onkran annan at rinda.

Viðmerkingarnar taka ikki endaliga støðu til, hvør so í framtíðini skal rinda hesa útreiðslu, men tað verður tó sagt, at ein avleiðing av uppskotinum kann verða, at onnur skip og bátar, enn tey hjá Strandfaraskipum Landsins, koma at gjalda meir.

Sambært stýrisskipanarlógini § 41 má eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg.

Útreiðslan, sum landskassin í dag rindar fyri havnargjøld hjá Strandfaraskipum Landsins, kann sostatt ikki verða flutt yvir á onnur skip og bátar, uttan at støddin á hækkaðu gjøldunum verður ásett beinleiðis í lógini. Tað sama hevði t.d. verið galdandi, um landið royndi at sleppa sær undan gjaldi til kommununa fyri vinnuligt burturkast hjá almennum stovnum, telefonútreiðslur hjá landsstovnum til almenna P/f Føroya Tele, o.l. Slíkt ber til, men krevur, at hækkaðu gjøldini, sum onnur so noyðast at gjalda, mugu ásetast beinleiðis í lógini.

Tað krevur so samstundis, at ásetingin í § 1, stk. 2 í fyriliggjandi uppskoti verður strikað, tí har stendur, at gjaldið ikki kann verða hægri enn kostnaðurin av at veita tænastuna. Verður hetta gjørt, er tað samstundis eitt frávik frá § 50 í kommunustýrislógini.

Sum uppskotið er orðað, kann kostnaðurin sostatt bert verða fluttur til kommununa at rinda av kommunuskattinum.

Hóast einki í lógartekstinum ella viðmerkingunum bendir á, at tað sum liggur aftan fyri uppskotið, er at flyta uppgávur og harvið útreiðslur frá landi til kommunur, so eigur hesin møguleikin eisini at verða viðgjørdur.

Spurningurin er so, um nakað mark er fyri, hvørjar uppgávur og útreiðslur landið kann flyta yvir á kommunur at taka sær av og gjalda, heilt ella lutvíst.

Kommunalfulltrúin sigst vanliga at hava ymiskar avmarkingar, herundir eina geografiska avmarking. Heimildirnar hjá kommununi eru sostatt avmarkaðar, til tað geografiska økið, sum kommunan fevnir um. Hinumegin, má tað tí eisini metast at vera í andsøgn við hesa geografisku avmarking, um landið leggur uppgávur ella útreiðslur til kommunur at taka sær av, sum røkka út um geografiska økið hjá kommununi.

Í donskum kommunalrætti verður mett, at kommunur út frá tí sonevnda "uppgávubýtisprinsippinum", sum útgangsstøði ikki kunnu taka sær av ella veita fíggjarligan stuðul til raksturin av uppgávum, sum lóggávan einans áleggur ella heimilar lands- ella øðrum almennum myndugleikum at taka sær av.

Um hugt verður nærri at útreiðslunum hjá Strandfaraskipum Landsins til havnargjøld, so kann okkurt av hesum gjøldunum helst sigast at fella innan fyri geografiska økið hjá viðkomandi kommunu, sum missur hesa inntøku, t.d. siglingin millum Havnina og Nólsoynna. Flestu

gjøldini viðvíkja tó sigling millum kommunur og kunnu tí ikki sigast burturav at viðkoma borgarunum í tí kommunu, sum missir havnargjaldið. Tað er tí ivasamt, um landið, uttan at gera seg inn á kommunalfulltrúina, kann krevja, at hesar kommunur skulu rinda útreiðslurnar hjá landinum til havnargjald í tann mun, talan er um havnargjald hjá strandfaraskipum, sum ikki sigla millum havnir í somu kommunu.

Í viðmerkingunum verður eisini sagt, at fólkaflutningur hevur alstóran týdning **fyri landið sum heild**, og er hetta helst orsøkin til, at landið í lógini um fólka- og farmaflutning hevur staðfest, at hetta skal vera ein landsuppgáva, og sostatt ikki ein privat ella kommunal uppgáva. Spurningurin um kommunala útjavnan er tí heldur ikki viðkomandi fyri málið.

Óskrivaðu reglurnar aftan fyri kommunalfulltrúina kunnu verða settar til síðis við ásetingum í aðrari løggávu. Tað er tó einki í lógartekstinum ella viðmerkingunum ið bendir á, at hetta hevur verið ætlanin við uppskotinum.

Vísandi til omanfyristandandi má staðfestast, at ávaringarnar sum m.a. Innlendismálaráðið reisir, mugu takast í størsta álvara.

Tað kann sostatt ikki útilokast, at eitt møguligt sakarmál kann føra til, at lógin verður sett til viks av dómstólunum, grundað á andsøgn við antin valdsbýtið ella tær avmarkingarnar, ið eru galdandi fyri ognartøkulógir. Verður lógin ikki sett til viks, er vandi harnæst fyri, at landskassin kann verða álagdur endurgjald fyri ognartøku.

Ivamál um markið millum løggevandi og dømandi valdið, og um hvat er at skilja við "hvor almenvellet kræver det", eru spurningar, sum byggja á eina meting, sum bert dómstólarnir endaliga kunnu døma um. Tað kann sostatt ikki greitt staðfestast, um uppskotið gongur ímóti yvirskipaðum reglum, jbr. § 57, stk. 1, nr. 1 í tingskipanini.

Viðvíkjandi spurninginum um endurgjald, so er tað upplýst í viðmerkingunum, at *"lógaruppskotið fær ávirkan á møguligar avtalur, sum Strandfaraskip Landsins hava um havnargjald. Tað er ikki møguligt at siga, um hetta kann viðføra, at landið skal rinda endurgjald."* Tað eigur í hesum sambandi at verða lagt afturat, at tað ikki er vist, at møguligt endurgjald kann avmarkast til hetta. Tað er sostatt ikki óhugsandi, at eitt møguligt endurgjald kemur upp á somu upphædd, sum landið kann spara við, at lógin verður samtykt.

Hóast verjuskip, vaktar- og bjargingarskip, sum landið eigur, og havrannsóknarskip møguliga ikki rinda nøkur gjøld til havnir í dag, so merkir tað ikki, at tað er í lagi, at landið við lóg avsker hendan møguleika, uttan at hetta reisir somu spurningar, sum eru viðgjørdir omanfyri, viðvíkjandi havnargjøldum hjá Strandfaraskipum Landsins.

9. november 2009

Kristina Samuelsen, ráðgevi